## Terry verður verandi

Liðskiparin hjá Chelsea, John Terry, hevur langt um leingi úttala seg um slaturin, at hann umhugsar at flyta úr verandi felag til Manchester City. Tað er eingin loyna, at Mark Hughes leingi hevur ynskt at fáa sterka miðverjuleikaran til nýríka City, og tann veruleiki, at Terry ikki hevur sagt nakað, hevur verið vatn á mylluna hjá slatur-dagbløðunum. Men nú hevur John Terry manað allan slatur til jørðina. Hann hevur týðiliga sagt við enskar miðlar, at tað ongantíð hevur verið upp á tal, at hann skuldi flyta úr Chelsea. »I am totally committed to Chelsea, always have been. Me leaving was never a possibility«, hevur John Terry nú sagt við enskar fjølmiðlar.



## Zlatan samdur við Barcelona

Tað tykist nú vera púrasta greitt, at Zlatan Ibrahimovic skiftir til Barcelona. Í øllum førum sigur Txiki Begiristain, stjóri í Barcelona, at felagið og spælarin eru so at siga samd um treytirnar fyri einum sáttmála. Ein partur av avtaluni við Inter, sum Zlatan í løtuni er sáttmálabundin at, er, at Samuel Eto´o skal til italska felagið, og fyrr í vikuni var greitt, at har eru sáttmálatreytirnar greiddar. Soleiðis er nú alt, sum bendir á, at handilin verður veruleiki, og gongst eftir vild, kann Zlatan Ibrahimovic heilsa upp á áskoðararnar á Camp Nou longu mánadagin.

# Fimm eru í vanda fyri at flyta niður

**Eftir at HB fyri triðju ferð á rað fór av vøllinum við einum stigi, er tað ikki óhugsandi, at B68 og Víkingur kunnu geva oddaliðnum kapping**



**Eftir heimatap ímóti KÍ sær tað heilt svart út hjá 07 Vestur. Tað eru átta stig fram til ÍF og bjargingina undan niðurflyting.**

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**16. UMFAR**

*Jákup Mørk*

Í gjár høvdu B68 og Víkingur frí. Orsaka av steypafinaluni ólavsøkudag, verður oyggjauppgerðin á Svangaskarði ikki spæld fyrrenn mikukvøldið 5. august.

Tað var ein sjálvfylgja, at toppliðið HB var stórfavorittur í Gundadali ímóti niðurflytingarhótta ÍF. Men tað gekk ikki, sum teir í HB høvdu vónað. Fyri triðju ferð upp í slag fóru havnarmenn av vøllinum uttan at hava vunnið fulla úrtøku: 2-2 ímóti B36, og so tvær ferðir 0-0 – á Argjum og nú á heimavølli ímóti ÍF.

Ofta hevur verið tikið til, at europeiska luttøkan kostar í heimligu kappingini. Fleiri dømi eru um, at fokus á Europa hevur borið við sær, at tað hevur gingið minni væl í landskappingini. Hjá HB kann uggin vera, at tað ofta hevur víst seg, at úrslitini verða betri, tá ið altjóða luttøkan er av. Tað er hon nú hjá HB!

At oddaliðið í trimum royndum bara hevur vunnið trý stig, ber við sær, at tað er vorðið væl tættari í toppinum, enn tað eina tíð sá út til, at møguleikar vóru fyri, at tað skuldi verða.

Um tað fer at eydnast B68 at vinna heimadystin ímóti Víkingi, so fer munurin fram til HB bara at verða fýra stig til toftamonnum, sum sunnudagin 16. august skulu spæla í Gundadali ímóti HB. Tað kann gott fara at vísa seg, at tað fer at verða eitt slag av finalu.

### Spennandi botnstríð

Eftir heimatap ímóti KÍ sær tað heilt svart út hjá 07 Vestur. Tað eru seks stig fram til næstaftasta plássið, sum KÍ er á, og tað eru átta stig fram til ÍF og bjargingina undan niðurflyting.

Hóast tað sær svart út, so er tað eitt sindur torført at avskriva 07 Vestur. Avrikini boða frá, at tað er potentialið í liðnum, men hóast leikliga avrik, sum ikki boða frá niðurflytingarkandidati, so tykist tað í løtuni torført at finna nakað lið, sum tað kann vera sannlíkt, at 07 Vestur skal hava møguleika at vinna á. Sunnudagin fara vágamenn at fáa sama møguleika í Gundadali, sum ÍF hevði ígjár.

Støðutalvan sigur frá, at tað eru fimm lið, sum kunnu verða blandað upp í stríðið fyri at sleppa undan niðurflyting. Umframt 07 Vestur er KÍ framvegis høvuðskandidatur at flyta niður. Ígjár vann KÍ í Sørvági, men tað eru framvegis tvey stig fram til bjargingina. Avrikið var kanska ikki so sannførandi ígjár, men tað sigur seg sjálvt, at trý stig aftrat á stigakontina ber við sær, at moralurin fer eitt skump rætta vegin, nú tíggju stig eru komin á kontina burtur úr fimm teimum seinastu royndunum.

ÍF úrslitið í Gundadali ígjár var undirstriking av, at fuglfirðingar ætla sær og tykjast hava førleika til at renna undan niðurflytingini. Tvær tær seinastu ferðirnar hava teir vunnið fýra stig.

Omanfyri KÍ og ÍF eru AB og B36. Tað kann væl fara at vísa seg, at høvuðsstaðarfeløgini skulu renna skjótari, enn tey higartil hava gjørt, um tey ikki skulu enda í rættiligum vanda fyri at flyta niður. Burtursæð frá heimasigrinum ímóti 07 Vestur 20. juni, so skal leitast aftur til 19. apríl fyri at finna B36 sigur. Tann dagin vann B36 1-0 heimasigur á KÍ.

Avrikið í Runavík bendi ikki á, at B36 fer at lætta sær á. Tvær tær næstu ferðirnar eru B68 og Víkingur á skránni. 15. august fer AB at vitja B36, og 19. august fer B36 til Fuglafirðar. Tað kunnu gerast sannir lagnudystir fyri øll hesi trý – ÍF, AB og B36.

# Nýggjur løgmaður og nýtt steyp

**Fyri einum ári síðani varð tað greitt, at B36 hevði vunnið løgmanssteypið til ognar, og í heyst varð tað greitt, at tað fór at vera nýggjur løgmaður, sum fór at handa løgmanssteypið**

**LØGMANSSTEYPIÐ**

*Jóannes Hansen*

Tá ið Kaj Leo Johannesen um seks tíðina ólavsøkudag fer at handa løgmanssteypið til Víking ella EB/Streym, verður tað fyrsta ferðin, at maðurin, sum handar steypið, hevur altjóða royndir sum fótbóltsspælari – bæði í Europa Cup og á landsliðnum.

Feløgini hava ivaleyst serligt fokus á, at atgongumerki til europeiska luttøku standa upp á spæl, men tað er serlig løta, tá ið løgmanssteypið verður handað.

Serligt er tað hesa ferð, at talan er um nýtt steyp. Orsøkin er tann, at B36 í fjør vann steypið til ognar, hóast B36 ikki var partur av finaluni.

Fyrsta løgmanssteypið varð latið at kappast um í 1989. HB, sum frammanundan hevði vunnið eitt ísafjarðarbikar og tríggjar ísafjarðarsúlur til ognar, vann fyrsta løgmanssteypið til ognar í 1998. Í fjør vóru tíggju ár síðani, at farið varð undir kappingina um næsta løgmanssteypið. Reglurnar siga, at tað liðið, sum hevur vunnið steypið oftast, tá ið tíggju ár eru farin, hevur vunnið tað til ognar. Tí hevur tað verið neyðugt at fáa nýtt steyp til vega í ár.

**Løgmanssteypið 1989-2008**
**1989:** B71-HB 0-0 eftir longda leiktíð
Nýggjur dystur B71-HB 0-2:- Oddbjørn Joensen, Gunnar Mohr
**1990:** GÍ-KÍ 1-6: Per Dalheim – Beinur Poulsen, Kurt Mørkøre, Olgar Danielsen, Allan Mørkøre br, Todi Jónsson, sjálvmál
**1991:** B36-HB 1-0: Bergur Magnussen –
**1992:** HB-KÍ 1-0: Gunnar Mohr –
**1993:** B71-HB 1-1 eftir longda leiktíð: Páll á Reynatúgvu – Rúni Nolsøe
Nýggjur dystur B71-HB 2-1: Torbjørn Jensen, Páll á Reynatúgvu – Hans Petur í Brekkunum
**1994:** B71-KÍ 1-2: Eli Hentze br – Jákup Mikkelsen br, Arnold Joensen
**1995:** B68-HB 1-3: Aksel Højgaard – Rúni Nolsøe, Andreas F. Hansen, Eyðun Samuelsen
**1996:** GÍ-HB 2-2 eftir longda leiktíð: Henning Jarnskor, Símun Petur Justinussen – Hallur Danielsen, Petur Slyne
Nýggjur dystur GÍ-HB 5-3 eftir longda leiktíð. Eftir vanliga leiktíð 2-2: Rúni Justinussen (2), John Petersen, Símun Petur Justinussen, Agnar Højgaard – Uni Arge (2), Hallur Danielsen
**1997:** VB-GÍ 0-6: - Henning Jarnskor (3), Sámal Joensen, Pauli Jarnskor, Øssur Hansen
**1998:** HB-KÍ 2-0: Hans á Lag, Andrew av Fløtum –
**1999:** KÍ-B36 3-1: Rógvi Jacobsen, Kurt Mørkøre, Arnold Joensen – Jens Kristian Hansen
**2000:** GÍ-HB 1-0: Óli Hansen –
**2001:** B36-KÍ 1-0: Jens Kristian Hansen –
**2002:** HB-NSÍ 1-2: Rógvi Jacobsen – Ulrik Balling, Brynjolvur Nielsen br
**2003:** B36-GÍ 3-1: Jens Kristian Hansen, John Petersen, Jákup á Borg - Súni Olsen
**2004:** NSÍ-HB 1-3: Helgi L. Petersen – Heine Fernandez, Rókur Jespersen, Páll M. Joensen
**2005:** GÍ-ÍF 4-1: Hanus Jacobsen (3), Áslakur R. Petersen – Gunnar Nielsen br
**2006:** B36-KÍ 2-1: Fróði Benjaminsen, Amed Davy Sylla – Atli Danielsen
**2007:** EB/Streymur-HB 4-3: Sorin Anghel, Hans Pauli Samuelsen, Arnbjørn Hansen, Karoly Potemkin – Páll M. Joensen, Rógvi Jacobsen, Vagnur M. Mortensen
**2008:** B36-EB/Streymur 2-3: Karoly Potemkin (2) – Arnbjørn Hansen (2), Hans Pauli Samuelsen